SOSIALURIN

Nr. 84 — 26. OKTOBER 1966 — 39. ÁRG.

Sannur tryggleiki

SANNA TRYGD FYRI ØLL MENNISKJU KANN EINANS HITT SOSIALISTISKT SKIPAÐA SAMFELAGIÐ SKAPA. HETTA KEMUR AV NÁTÚRULIGUM GRUNDUM. SOSIALISMAN BER Í SÆR HENDA TRYGGLEIKA, OG SOSIALISMAN HEVUR TAÐ FRAMMUM AÐRAR POLITISKAR STEVNUR, AT HON SETUR MENNISKJUNA FYRST

Sosiala trygdin skal sjálvandi umfata alt, ið einum menniskja kann viðurfarast — hon skal stutt sagt umfata øll viðurskifti, ein menniskja kann koma út fyri frá vogguni til grovina. Vit eru langt frá komin so langt, at hetta er veruleiki, ja, nóg illa at hetta er hálvur veruleiki, men seinasta landsstýri gjørdi eitt stórt bragd her og legði eitt gott grundsteði. Um hetta verður sagt í »Grundsjónarmiðum javnaðarflokksins:

»Øllum borgarum samfelagsins verður veittur sosialur tryggleiki, og samfelagið ber útreiðslurnar, ið standast av sjúku, avlamni, van lukku, elli, inntøkumissi ella hendingum og umstøðum, ið fora við sær trongd til trygd og hjálp at troyta eina tilveru uttan sakn og trot.

Øllum arbeiðandi menniskjum verður tryggjað eitt minstamark av lón, og øllum árhaldsførum ella treingjandi sosialtrygd, ið svarar til tað, ið neyðugt er til livsins uppihald.«

KROSS FYRI

HON skrivar

HVÍ TÆR VELJA JAVNAÐARFLOKKIN

Vit novðast tíverri at ásanna, at tað ikki altíð er so lætt at fáa kvinnuna at taka orðið og siga sína hugsan, annaðhvørt hetta er um politikk ella onnur viðurskifti. Tað er eins og hin føroyska kvinnan letur frá sær sjálvsálit tá mannfólkini og letur teimum upp í hendi at ráða fyri borgum — eisini har kvinnan ivaleyst var betur før fyri at lagt samfelagsmálini soleiðis til rættis, at tey vóru heildini at meira gagni og storri fyrimun, enn tá ið mannfólkini gera arbeiðið.

Einki ilt um mannfólkini, heldur ikki um teir, ið standa í broddinum í politikki; men óreingiligur veruleiki er tað, at politisku avgerðir mannfólkanna við hvørt gripa djúpt inn í virkisoki kvinnurnar.

Vit hava fingið 3 kvinnur í heilt fáumørðum at sagt frá, hví tær velja JAVNAÐARFLOKKIN. — Ord teirra koma í komandi blaðum.

* * *

GÓÐ RÁÐ



Skalið á eggum brestur lættliga, tá tey eru kold og fara í heitt vatn. Lat tey liggja í flógvum vatni eina lotu, so hendir einki.

Brævkassin

Brævkassin.

Javnaðarflokkurin kom fyrstu ferð á ting í 1928, tá vóru bara tveir aðrir flokkar á tingi: sjálvstýrisflokkurin og sambandsflokkurin Aðrir flokkar eru komnir síðan, og hevur hetta sjálvandi broytt støðuna; men kann her verða sagt frá, hvørjar broytingar eru farnar fram millum nevndu flokkar frá 1928 til seinasta val?

Rókur.


SVAR: Sum longu sipað til í fyrispurninginum er rættuliga nógv hent á leiðini frá 1928 og fram til 1962; men vit skulu her siga frá støðubroytingini hjá nevndu flokkum.

	1928	1962
Javnaðarfl.	10,6 pst.	27,5 pst.
Sambandsfl.	46,0 pst.	20.4 pst.
Sjálvstýrisfl.	42,4 pst.	5,9 pst.

M ÚR TINGANESI

O í Tinganesi leingjast tær:
L svarta, hvíta, reyða og gula
A til tær ei meira leiða
R skal sterka hondin hula!

SMÁSKEMT



— Hann gifti seg við systur til konu sína, sum doyði.

— Ja, hann segði, at hann orkaði ikki at hugsa uppá at fáa eina vermóður aftrat.

Prøv TIL Sosialin

DANSKAR LÓGIR

Hetta landsstýrið hevur ofta verið speirikið fyri tær mongu donsku lógirnar, tað hevur sett í gildi í Føroyum, hóast hetta gongur beint tvørtur ímóti tí »sjálvstýrispolitikkin«, sjálvstýrisflokkarnir í mong ár hava talað um, og hóast hetta sjálvandi gongur ímóti tí politikki, hesir eru gingnir saman um undir sjálvstýrisheitinum (eitt skálkaskjól).

Men tað er ikki rætt at fara ov harðliga um hesi lógartiltøk, tí ivaleyst er her talan um ein høp av góðum lógum — góðum donskum lógum, sum klókir heilar hava sett saman til bata fyri samfelagið.

Vit skulu ikki undirmeta okkum sjálvar; men ofta hevur føroyskt lógarsmið verið merkt av mistøkum — mistøk, ið vit mugu halda, at fólkatingið við sínum 179 tingmonn um (móti okkara 29) og øllum ráðharrastovnunum til hjálpar, ikki so lætt skuldi komið út fyri.

VÆL SAGT

At verða revsaður hevur stóra ávirkan, men uggan enn storri. Uggan aftanú eina revsing er eins og sól aftan á eitt æl.

(Goethe)

Menniskjuni broytast so nógv, at ein altíð finnur okkurt nýtt við teimum.

Tá eg hugsi aftur í tíðina, havi eg ongatíð angrað tær ferðir, eg havi gjørt okkurt váðaverk, men ofta at eg ikki hava gjørt tað.

(Elizabeth Bowen)

SJÓVINNA

Hvaðani pengarnar frá ...

TAÐ MÁ vera eindomi, at ein fiskimannafelagsformaður spyr, hvaðani pengarnir skulu koma frá, tá talan er um at veita fiskimonnum betri sømdir.

Hetta gjørdi Erlendur Patursson seg sekan í, tá JAVNAÐARFLOKK URIN setti fram uppskot um at veita fiskimonnum 1000 kr. í minstuløn. Frá tingsinsins roðarapalli spurdi hann javnaðarmenn: **»HVAÐANI SKULU TIT FÁA PENINGIN FRÁ?«** Hetta varð sagt, tá roynt varð at hækka krypilminstulønina hjá tjóðveldisleiðsluni í Fiskimannafelagnum frá 700 upp í 1000 kr.

Eisini »14. september« slapp sær upp í leikin, og hesin »fiskimannavinurin« aftraði seg ikki við at skriva:

»Og peningurin er ikki til, tíverri. Sjálvt javnaðarmenn áttu at dugað at skilt, at tú kanst ikki royta hár av berskøllunum manni.«

KIKKARIN

BRØÐURSKAPUR

»Sjálvstýrislandsstýrið« er nú einaferð ikki berur bróðurskapur, um teir í felag lovsyngja sjálvstýrinum. Undan seinasta vali skrivaði »Dagblaðið« um sjálvstýrisbróðurin sjálvstýrisflokkin:

»Gamla sjálvstýri er útdeytt ...soleiðis fer tað, ið ónatúrligt og óektað er, og ið ongastaðni hoyrir heima.«

5 spurningar


1. Í hvørjari takt verður bolero spælt?
2. Nær varð Nygárdsvold norskur forsætisráðharri?
3. Hvat merkir kynologi?
4. Hvør rakti við litspjáðing ljósins.
5. Hvør er høvuðsstaður í Kenya?

SVAR: 1) 3/4 takt 2) 1935 3) Búða-Jørra 4) Isaac Newton 5) Nairobi.

ÚT

* verður tað ikki heilt lætt hjá
* teimum tjóðveldisku loysingar-
* monnum at verja politikkin hjá
* hesum landsstýrinum, sum »14.
* september« fleiri ferðir hevur
* nevnt »sambands- og afturhalds
* politikk« — við sjálvstýrisheitinum sum skálkaskjóli!

Krossord:



Tvørturum: 1) likamslutur 7) fáa sær 8) ravmagn 10) liðugur 11) tiknir 14) seks 15) tóni 16) nót 18) drepa.

Niðureftir: 2) tóni 3) land 4) heiti 5) meira 6) gudur 9) mál 12) komfýri 13) undir fóti 17) skipastavir.

Veitst tú

AT einki uppskot er komið fram um Føroya fulla limaskap í Norðurlandaráðnum, fyrr enn P. M. Dam setti hetta fram á næstseinasta ráðsfundi í Reykjavík — seinri fekk uppskotið undirtoku frá ti sokallaða »sjálvstýrisiandsstýrinum.«

AT hin kendi italski tenorurin Giovanni Battista Rubini (1795—1854) tók ein høgan tóna við slikari megi, at hann breyt ósbeinið. Hetta hendi í La Scala í Milano í 1831.

AT í Japan verða húsini ikki nummererað eftir raðfylgjuni; men hitt elsta húsið er nr. 1, hitt næst elsta nr. 2 o.s. fr.

AT í 16. øld var tað hildin stór synd at roykja; tann, ið var funnin sekur í hesi synd, mátti missa neglirnar.

AT tvey tunn ullteppi halda betur hitanum enn eitt tjúkt; hetta stendst av luftini millum bæði teppini.

AT innlandsisurin í Antarktis á viss um økjum er meira enn 850 m tjúkkur.

hugskot

AT GRAVA GRAVIR

Undir viðgerðini av landsstýrismálunum í 1960 segði Hákun Djurhuus m. a. um sosialmálini:



»Í sosialmálunum er gjørt tað, ið gerast skal.«

um endurnýggj an skipaflotans »Tað er alt tøl, ið vísa, at tað gongur framá.« um hvi hann var ímóti eini skjótari og storri endurnýggjan av skipaflotanum:

»Vit vilja ikki vera við til at grava okkara egnu grøv!!!!«

Hetta er kanska forkláringin upp á, at skipaflotin bara í fjør minkaði við 300 tonsum!!!


BØRNINI

BYGD. Tá tú setur bókstavirnar niðanfyri annarleiðis saman, fært tú navnið á einari bygd:

SMKRSENOAR

* * *

KLOKKUGÁTA




1— 5 = tvøst
2— 6 = gjalda
7—10 = kyrk!
8—12 = venur

* * *

LOYNDARORÐ

Tá ið tú hevur funnið orðini niðureftir, fært tú á 2. og 4. reglu tvørturum navnið á einum sponskum og einum fronskum býi:




1. mold 2. góðveður 3. fuglur 4. visumannsnavn 5. profetur 6. banka 7. dansa.

FINN ORÐIÐ! Finn orð fyri mynd irnar, tak fyrsta bókstavin úr teimum, set rætt saman og tú fært orð fyri keðiligari hending.



* * *

FIMMARIN



1 = bræv og til matin
2 = ferðast
3 = í kirkjuni
4 = á kvøldi
5 = garnið



— Ein kann eisini doyggja fyri føði landið við altíð at skála fyri tí, segði logmaður!

* * *

Maðurin: Tú gert sum tú vilt, Jóhanna; men heldur tú áfram við at pina og plága meg, skal eg aftana deyðan standa uppaftur sum eitt spøkilsi og forfylgja tær, so leingi tú livir.

Konan: Ein kann ongatíð verða tað sama tvær ferðir, ha, ha!

* * *

Dag undan degi fara flest allir prísir upp; ein kann tí eins væl keypa seg fátækan í dag sum í morgin!

* * *

Á skrivstovuni:

Ein av skrivstovukvinnunum var gift og sat og fortaldi frá, at hon hevði verið brúdleypsferð.

Stjórin: Hvar vóru tit!

Kvinnan: Í Noreg og Danmark.

Stjórin: Frálikt — hvør av tykkum var í Danmark?

* * *

Ein bóndi, sum viðgongur, at seyðurin ver normalur, er neyvan normalur!

Fólkaheimið Føroyar

Alt samfelagsgagnligt virksemi má skiftast út frá umsorgan fyri felags áhugamál og fyri at fremja vælferð fólksins!